# Fótbóltur er mítt lív

**Franski fótbóltsúrmælingurin, Michel Platini, sum í áttatiárunum bergtók fótbóltsfjepparar kring allan knøttin við sínum kynstrum, er í hesum døgum á stuttari vitjan í Føroyum. Platini heldur tað verða umráðandi, at smáar tjóðir eisini taka lut í EM og HM undankappingum.**



*Michel Platini og FSF-formaðurin Óli Holm á tíðindafundi í FSF-húsinum fyrr í dag. Tað er Platini til vinstru og Óli Holm til høgru.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**FÓTBÓLTSVITJAN**
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Michel Platini er ikki hvør sum helst. Tann 50 ára gamli fraklendingurin, sum í síni tíð sum yrkisleikari umboðaði fronsku feløgini Nancy og Saint-Etienne og italska stórfelagið Juventus, er ídag ein av leiðandi persónunum í altjóða fótbólti. Hann var fleiri ferðir valdur til ársins spælara í Evropa, og av mongum verður hann framvegis mettur sum ein tann besti spælarin í heiminum nakrantíð. Sjálvur sigur Platini, at fyri hann er fótbólturin sjálvt lívið.

### Fótbólturin í framgongd

Komandi ár verður val av nýggjum forseta í evropeisku fótbóltssamgonguni, UEFA, og tá er Platini eitt av valevnunum. Sjálvur sigur fraklendingurin tó, at hetta ikki er orsøkin til vitjanina í Føroyum.

- Eg bleiv boðin til Føroya av Óla Holm, FSF-formanni, tá ið vit hittust bæði í sambandi við dystinum millum Frakland og Føroyar, umframt Ísrael og Føroyar í heyst, og eg havi valt at taka av. Men um FSF hevur hug til at peika á meg sum nýggjan UEFA-forseta, eru teir tó hjartaliga vælkomnir til tað, sigur Michel Platini.

Spurdur um gongdina í fótbóltinum síðani hann sjálvur gavst at spæla, sigur Michel Platini.

- Eg haldi, at seinnu árini hevur fótbólturin ikki verið nakað serligur, men tey bæði seinastu árini hevur tað tó verið ein framgongd. Vit hava fingið fleiri tekniskar spælarar fram í ljósið, og tað hevur ment spælið, heldur hann.

Á vitjan síni í Føroyum fer Michel Platini at hava fund við Fótbóltssambandið og við føroysku feløgini, og vónandi verður tíð til at uppliva eitt sindur av oyggjunum eisini, sigur Michel Platini.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og regn av og á. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og sirm ella mjørki. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og regn ella mjørki. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Upp í hvassan vind av útsynningi, mikudagin hækkar hann upp í útnyrðing. Sólglottar, men eisini ælingur, mikudagin sum kavi. Hitin fyrst um 8 stig, mikudagin niður móti frostmarkinum.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -10 |
| Nuuk | -4 |
| Qaqortoq | -1 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -3 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 18 |
| Tromsø | 7 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 10 |
| Keypmannah. | 12 |
| Helsinki | 6 |
| Moskva | 2 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 6 |
| Kiev | 2 |
| Bukarest | 3 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 20 |
| Róm | 21 |
| Malorca | 26 |
| Athen | 15 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 19 |
| New Dehli | 28 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 18 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | -- |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1025 hPa. við Føroyar fer suðureftir og mennist. Eitt lágtrýst, 989 hPa. sunnan fyri Ísland fer í útnyrðing og brúgvalagið haðani verður við Føroyar leygardagin.




**Í dag:**
Hátrýstið yvir Onglandi fer í landsyning og mennist. Lágtrýstið við Hvarvið fer norðureftir og dýpist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum sunnumorgunin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/11 kl. 06[00]– 18/11. 06[00]. Hitin í gjár: 1,8°
Minsti hiti máldur í nov.: - 7,2° - Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 17/11 kl. 06[00]– 18/11 kl. 06[00]
Avfallið higartil í november: 131,4 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

10. november Mánin næstur jørðini
16. november Fullmáni
23. november Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. Nov. | 08.04 | 20.30 | 07.04 | 19.30 | 07.19 | 19.45 | 10.04 | 22.30 | 11.04 | 23.30 | 06.19 | 18.45 | 05.19 | 17.45 | 08.19 | 20.45 | 09.19 | 21.45 | 07.49 | 20.15 | 09.04 | 21.30 |
| 19. Nov. | 08.57 | 21.23 | 07.57 | 20.23 | 08.12 | 20.38 | 10.57 | 23.23 | 11.57 | - | 07.12 | 19.38 | 06.12 | 18.38 | 09.12 | 21.38 | 10.12 | 22.38 | 08.42 | 21.08 | 09.57 | 22.23 |
| 20. Nov. | 09.49 | 22.13 | 08.49 | 21.13 | 09.04 | 21.28 | 11.49 | - | 00.23 | 12.49 | 08.04 | 20.28 | 07.04 | 19.28 | 10.04 | 22.28 | 11.04 | 23.28 | 09.34 | 21.58 | 10.49 | 23.13 |
| 21. Nov. | 10.38 | 23.00 | 09.38 | 22.00 | 09.53 | 22.15 | 00.13 | 12.38 | 01.13 | 13.38 | 08.53 | 21.15 | 07.53 | 20.15 | 10.53 | 23.15 | 11.53 | - | 10.23 | 22.45 | 11.38 | - |
| 22. Nov. | 11.22 | 23.57 | 10.22 | 22.57 | 10.37 | 23.12 | 01.00 | 13.22 | 02.00 | 14.22 | 09.37 | 22.12 | 08.37 | 21.12 | 11.37 | - | 00.15 | 12.37 | 11.07 | 23.42 | 00.00 | 12.22 |




## Morgunlestrar
**21. - 26. nov.**

***Jógvan Fríðriksson, prestur, lesur***

**Sálmar og skriftstøð:**

**Mánadagin 21. nov.:**
nr. 481 Tykist tað í neyð og pínu
nr. 403 Guð, títt er valdið

**Týsdagin 22. nov.:**
nr. 246 Í øldir hevur staðið her

**Mikudagin 23. nov.:**
nr. 192 Mín Jesus, lat mítt hjarta fá
nr. 76 Jesus, hitt einasta

**Hósdagin 24. nov.:**
nr. 332 Títt orð er, Guð, várt arvagóðs
nr. 334 Vit fylkjast, faðir, um títt orð

**Fríggjadagin 26. nov.:**
nr. 410 Leið, milda ljós
nr. 409 So tak tá mínar hendur

**Leygardagin 26. nov.:**
nr. 1 Harra Guð, títt dýra navn og æra
nr. 2 Lovsyng tínum Harra

5 707265 100067 >